## Lági dollarin kostar nógv

Oljufeløgini, sum arbeiða í danska partinum av Norðsjónum, framleiða umleið 400.000 tunnur um samdøgrið. Tað er á leið tað, sum framleiðast kann. Harafturat er oljuprísurin góður. Um vikuskiftið fór hann upp um 30 dollarar fyri tunnuna.

Men alt er ikki so gott kortini, tí hóast tann góða prísin fæst ov lítið fyri oljuna, og orsøkin er tað lága virðið á amerikanska dollaranum. Sunudagin var dollarin verdur 5,82 krónur, og tað er lítið samanborið við fyri einum ári síðani, tá ein dollari var verdur 7,11 krónur. Fyri oljufeløgini í danska partinum av Norðsjónum merkir fallið, at tey nú fáa 70 milliónir krónur um dagin fyri oljuna. Fyri einum ári síðani var dagliga virðið 86 milliónir krónur.

Londini í OPEC hava gjørt av at skerja sína framleiðslu eina millión tunnur um dagin til 23,5 milliónir tunnur, og frá 1. apríl ætla tey at halda prísinum oman fyri 30 dollarar.

## Statoil kanska til Irak

Norska Statoil hevur boðið sær til at hjálpa irakum við at endurbyggja oljuídnaðin, og sum skilst hevur felagið fingið eitt positivt svar frá stjórnarráðnum í Bagdad.

Ætlanin hjá Statoil er at skipa iraksku oljuvinnuna eftir sama leisti, sum nýttur er í Noregi. Tað fer millum annað at hava við sær, at teir almennu myndugleikarnir skulu hava neyvt eftirlit við vinnuni, men at útlendsk feløg fáa rætt til at leita eftir og framleiða olju. Sum ein lið í arbeiðinum hava irakar fingið tilboð um at senda fólk til uppvenjingar í Noregi.

Tað er kortini ikki hugsandi, at Statoil verður virkið í Irak fyribils, tí myndugleikarnir í Oslo hava hug at bíða, til irakar velja sær eina stjórn. Kortini er avtalað, at norsk umboð skulu hitta umboð fyri amerikonsku orkumyndugleikarnar tann 19. mars at tosa um eitt komandi samstarv í Irak.

## Skulu sendast heimaftur

Sambært blaðnum Sunday Times ætlar stjórnin hjá Tony Blair, forsætisráðharra at senda umleið 40.000 iraksk flóttafólk heimaftur.

Blaðið veit at siga, at umboð fyri bretska innanríkisráðið skulu hava fund við ST og altjóða hjálparfelagsskapir um ætlanina, men felagsskapurin Refugee Action ávarar stjórnina ímóti at senda flóttafólkini aftur til Irak. Felagsskapurin sigur, at hvørki amerikanska hersetingarvaldið ella iraksku myndugleikarnir eru førir fyri at taka ímóti so nógvum flóttafólkum, soleiðis sum viðurskiftini í Irak eru.

Umframt teir 40.000 irakararnar, sum Blair-stjórnin ætlar at senda heim, eru umelið 20.000 aðrir irakar í Bretlandi. Sambært Sunday Times ætlar stjórnin, at teir skulu fara heimaftur sjálvbodnir, tá val hevur verið í Irak, og landið hevur fingið nýggja stjórn.

## Skal takast uppaftur

Eitt av teimum stóru herskipunum frá seinna heimsbardaga, týski slagkrússarin »Admiral Graf Spee«, skal nú takast uppaftur. Skipið liggur á botni úti fyri strondini í Uruguay.

»Admiral Graf Spee« varstoltleikin hjá týska herflotanum, tá seinni heimsbardagi byrjaði, og ta fyrstu krígstíðina søkti skipið fleiri bretsk skip har suðuri í Atlantshavinum. Í desember í 1939 sendu bretar fleiri herskip at leita eftir týska krússaranum og at gera av við hann. Í einum bardaga varð týska skipið so meint rakt, at tað mátti leita sær í havn í Uruguay, men tá myndugleikarnir har eftir trýsti úr Bretlandi kravdu skipið útaftur, gjørdi skiparin, Hans Langsdorff, av at søkkja tað. Tríggjar dagar seinni beindi hann fyri sær.

– Skipið var eitt meistaraverk, og Hans Langsdorff, skipari, var ein heiðurligur maður, sigur Mensun Bound á Oxford University, sum er ein av monnunum aftan fyri ætlanina at taka skipið uppaftur.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# 42 doyðu í svimjihøllini



*Soleiðis sá Transvaal Park út aftan á vanlukkuna leygardagin*

**Myndugleikarnir halda, at byggifusk var orsøkin til, at takið á einari stórari svimjihøll í Moskva datt niður leygardagin**

VANLUKKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Gjáramorgunin váttaði borgarstjórin í Moskva, Jurij Luzjkov, at vanlukkan seinnapartin leygardagin hevði kravt 42 mannalív, og at minst 110 fólk høvdu fingið skaða. Av teimum, sum doyðu, vóru minst seks børn.

Myndugleikarnir sendu alt fyri eitt stórar kranar og bjargingarmenn við servandum hundum at leita eftir fólki í teirri stóru høllini, men umstøðurnar hjá teimum neyðstøddu vóru ikki serliga góðar, tí tað frysti ímillum 15 og 20 stig í Moskva leygardagin.

Transvaal Park var tann størsta og mest nútímans svimjihøllin í Moskva. Høllin varð tikin í nýtslku í 2002 og var sera væl umtókt sum frítíðarstað. Hildið verður, at eini túsund fólk mundu vera inni, tá takið brádliga datt niður.

Russisku myndugleikarnir vístu aftur øllum gitingum um, at talan kundi vera um yvirgang.

Tað var eitt turkiskt felag, sum bygdi Transvaal Park, og beint eftir vanlukkuna vildu myndugleikarnir vera við, at talan mundi vera um byggifusk. Stjórin í svimjihøllini og maðurin, sum hevði eftirlitið við byggingini, vóru til avhoyringar hjá løgregluni í Moskva sunnudagin. Illgruni er um, at høllin bleiv ikki bygd eftir teimum reglum, sum eru galdandi, skrivar AP.

# Jens Evensen deyður

**Fyrrverandi norski havrættarráðharrin Jens Evensen doyði um vikuskiftið**

ANDLÁT
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Jens Evensen var 86 ára gamal, nú hann doyði.

Sum ráðharri í havrættarmálum í sjeytiárunum stóð Jens Evensen fyri teimum norsku samráðingunum, tá fiskimarkini vórðu víðkað, og hann verður av fleiri mettur sum maðurin, ið útvegaði Noregi ræðisrættin yvir oljuni og gassinum í norsku undirgrundini.

Í 1985 gjørdist Jens Evensen fólkarættardómari í altjóða dómstólinum í Haag. Tólv ár frammanundan høvdu myndugleikarnir avdúkað, at politiski skrivari hansara, Arne Treholt, hevði njósnast fyri Sovjetsamveldið, og Evensen stúrdi fyri, at hetta fór at forða honum í at verða valdur til dómara í Haag. Men í ST var hann tann, sum fekk flestar atkvøður.

Jens Evensen var dómari í altjóða dómstólinum, til hann fór frá fyri aldur í 1994.



